Suðuroyar Sjúkrahús
800 Tvøroyri

## Læknaskrivari

Vegna barnsburðarfarloyvi er eitt hálvtíðarstarv sum læknaskrivari leyst til setan í tíðarskeiðinum frá 15. januar til 1 september 2004.

Løn sambært sáttmála millum Starvsmanna-felagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til Herfríð Petersen, læknaskrivara, tlf. 37 11 33 lokal 122.

Umsóknir við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:

**Umsjónarmannin**
Suðuroyar Sjúkrahús
800 Tvøroyri

Umsóknarfreist 31. desember 2003.

## Sjúkrakassalimir í Sjúkrakassa Vestmanna Læknadømi

Frá 1. januar 2004 verður limagjaldið fyri A- og B-limir 210 kr. um mánaðin.

Gjaldshátturin er kvartalsliga, t.v.s. at limagjaldið kr. 630,- fellur til gjaldingar fyrsta í hvørjum ársfjórðingi.

Eisini verður sagt frá, at frá 1/1-2004 eru avgreiðslutíðirnar:
týsdag 10.00 - 16-00 og
hósdag 14.00 - 18.00

**Sjúkrakassi Vestmanna Læknadømis**






**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 1885, P/F Vita Margarin, 100 Tórshavn.
**Nevnd:**
**Farin frá sum formaður:** Erling Gardeweg Beyer, Myggenesvej 6, 8200 Århus N.
**Innkomin í nevndina sum formaður:** Mogens Nielsen, Åsvej 9, Silstrup, DK-7700 Thisted.
*Farin úr nevndini:* Peter Foged Nielsen, Simons Bakke 44, DK-7700 Thisted.

*Skráseting Føroya tann 15. desember 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2111, Sp/f Laksafóður, 410 Kollafjørður.
**Navn:** P/F Laksafóður
**Adressa:** 410 Kollafjørður
Felagið er strikað eftir samanlegging við skrásetingar-nr. P/F 1008, P/F Vestlax.

*Skráseting Føroya tann 15. desember 2003*

*Kristin Balle*


## Uppstilling til formansval í Føroya Postfelag

Sambært § 12 í lóg felagsins verður boðað til uppstilling til formansval í Føroya Postfelag.

Uppskot skulu vera skrivstovu felagsins í hendi innan 15. januar 2004, við skrivligari váttan frá uppstillaða.

Formaður verður vald á aðalfundi felagsins, sum verður 28. februar 2004.

Fráboðanir um uppskot verða at senda

**Føroya Postfelag**
Tinghúsvegur 15
100 Tórshavn

## Vallistar

Sagt verður frá, at vallistar til løgtingsvalið 20. januar 2004 í Fuglafjarðar kommunu eru til skjals:

- Á kommunuskrivstovuni í Fuglafirði
- hjá Eli Jensen, Hellur

**Frá 17. til 31. desember 2003**

Kærur um skeivleikar á listanum skulu sendast býráðnum í seinasta lagi 4 dagar eftir, at framløgufreistin er úti.

**Fuglafjarðar kommuna**

## Kunngerð

Tað verður hervið kunngjørt, at vallistin til løgtingsvalið 20. januar 2004 liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í vanligari skrivstovutíð frá týsdegnum 16. desember 2003 til mánadagin 22. desember 2003, báðir dagar íroknaðir.

Kæra um, at onkur ikki er komin á listan, ella at onkur av óréttum er tikin við, skal skrivliga vera býráðnum í hendi í seinasta lagi 23. desember 2003.

Tvøroyrar Kommuna

## Vága Javnaðarfelag

2. og møguliga 3. uppstillingarfundur verður í Síhúsinum í Sørvági mikukvøldið kl. 20.00.

**Vága Javnaðarfelag**

## Havnar Arbeiðskvinnufelag

Sambært lógum felagsins § 6 er val av formanni á aðalfundinum 28. februar 2004.

Uppskot til formansevni skal skrivliga stílast til nevndina og sendast til:

Havnar Arbeiðskvinnufelag
Postsmoga 161
110 Tórshavn

innan 1. januar 2004.

Saman við uppskotinum skal sendast skrivlig váttan frá viðkomandi, sum er í uppskoti um, at viðkomandi vil taka við vali.

**Nevndin**

## Havnar Arbeiðskvinnufelag

Uppskot um mál til viðgerðar á aðalfundi felagsins tann 28. februar 2004, skal skrivliga stílast til formannin og sendast til:

Havnar Arbeiðskvinnufelag
Postsmoga 161
110 Tórshavn

innan 1. januar 2004.

**Nevndin**

## Kunngerð

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at vallistin fyri Leirvíkar Kommunu til løgtingsvalið tann 20. januar 2004 liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskivstovuni frá fríggjadegi 12. desember til fríggjadagin 19. desember 2003.

Kæra um, at onkur ikki er komin á listan ella, at onkur av óréttum er tikin við, skal skrivliga verða Leirvíkar kommuni í hendi í seinasta lagi mikudagin 23. desember 2003.

Valkort verða send øllum í Leirvíkar kommu, ið smb. vallistanum hava atkvøðurætt til løtingsvalið tann 20. januar 2004.

Leirvík tann 12. desember 2003

**Leirvíkar Kommuna**

## Frá Arbeiðarafelagnum »Hæddini«

Skrivstovan er stongd vegna jólaferiu, frá 22. desember til 5. januar 2004.

**Nevndin**



# ítróttur

Nr. 240 • mikudagur • 17. desember 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo


# Flemming og Rógvi skulu venja kvinnurnar

**Hondbóltssambandið hevur gjørt av, at tað verða Flemming Raben og Rógvi Nielsen, sum í felag fara at taka sær av kvinnulandsliðnum**

KVINNULANDSLIÐ
*Jákup Mørk*



*Formaðurin í HSF tykist sera væl nøgdur um, at tað loksins hevur borið til at fara undir aftur arbeiðið við kvinnulandsliðnum*

Tað er nú nakað síðani, at Hondbóltssambandið so spakuliga fór undir at leita sær eftir venjara til kvinnulandslið. Eitt landslið, sum tað onkra tíð hevur verið tosað nógv um, men har tað higartil ikki er blivið til meira enn bara tosið, um sæð verður burtur frá tveimum landsdystum móti Svøríki fyri nakað av tíð síðani.

### Kapping í apríl

Nú skal tó broyting koma í. Eivind Jacobsen, sum er formaður í Hondbóltssambandinum, váttar, at HSF hevur gjørt av, at tað verða Flemming Raben og Rógvi Nielsen, sum framyvir koma at taka sær av kvinnulandsliðnum.

- Onkrar aðrar umsóknir vóru eisini til starvið, men vit hava so gjørt av, at hesir báðir eru teir, sum hóska best til tað, sum vit hava ímyndað okkum. Ikki minst tí teir eisini hava sera góðan kunnleika til einstøku leikararnar, sigur Eivind Jacobsen um valið, sum nú er tikið.

Og í mun til onkra aðra ferð, tá tosið hevur verið frammi, so hevur HSF ógvuliga konkretar ætlanir við kvinnulandsliðnum. Eitt nú hava vit áður víst á, at HSF hevur sýnt áhuga fyri tilmeldan til sonevndu Challenge-Trophy kappingina, sum er ein kapping fyri tey lond, sum ikki megna at ferðast í heimselituni. Hendan kappingin verður í apríl mánaði, og sambært formanninum, so verður tað miðað ímóti, at Føroyar tá skulu taka lut.

- Vit hava kanska ikki tær heilt stóru peningaupphæddirnar at arbeiða við, men vit halda okkum tó hava sett somikið av, av vit kunnu fara spakuliga ígongd. Ætlanin er so, at vit vera við í apríl mánaði, tá Challenge-Trophy kappingin er, og fyri mær tykist hendan kappingin vera eitt sera hóskandi útgangsstøði, heldur Eivind.

- Bæði tí vit her koma at spæla móti londum, sum í styrki eru á leið á okkara støði, og ikki minst tí tað fyri okkara viðkomandi hóskar sera væl, at kappingin er í apríl, tá okkara leikarar skuldu verið so væl fyri, sum yvirhøvur gjørligt.

### Hava góðar møguleikar

Eivind Jacobsen hevur í mangar mátar verið ein av teimum, sum hevur lagt eitt stórt arbeiði eftir sær innan kvinnuhondbólt, og hann dylir ikki fyri, at eftir hansara fatan hava kvinnurnar góðar møguleikar at gera seg galdandi.

- Vit eru nokk fleiri, sum halda, at kvinnurnar í sín part hava størri møguleika at røkka nøkrum góðum úrslitum, enn menninir hava tað. Í mun til aðrar ítróttargreinar, so tykist hondbólturin hava eitt nógv betri tak á kvinnunum, og hartil eri eg ikki so bangin fyri, at fysiski munurin verður so stórur, sum hann ofta er tað í manshondbólti. Tí vil tað í nógvar mátar vera lættari at koma upp at støðinum hjá fleiri av mótstøðuliðunum, men móti teimum stóru hondbóltstjóðunum koma vit helst ongan tíð at hava nakran møguleika, kortini, heldur hann.

Hvussu er og ikki, so er einki at ivast í, at fyri kvinnuligu leikararnar kring landið, eru tað góð tíðindini, sum HSF-formaðurin nú borðreiðir við. Sum skilst, so hava venjararnir báðir longu gjørt av, hvussu fyrsti bruttohópurin upp á 25 leikarar sær út. Boðini til hesar fara út nú ein av fyrstu døgunum, og longu mánadagin er ætlanin at hava fyrstu venjingina.

# Endaðu við framgongd

**Føroyar fluttu seg eitt pláss upp, nú FIFA fyri seinastu ferð í ár kunngjørdi styrkislistan**

FIFA-LISTIN
*Jákup Mørk*

Brasilia er framvegis á ovasta sessinum, og Frakland og Spania á teimum báðum næstu.

Tað er støðan, nú altjóða fótbóltssamgongan, FIFA, fyri 12. og seinastu ferð í ár hevur kunngjørt, hvussu teirra styrkislisti sær út.

Fyri flestu norðanlondini er støðan hampuliga hugalig. Danmark er follið eitt pláss aftur hetta seinasta árið, men teir teljast framvegis upp ímóti avgjørdi toppinum. Tað er Svøríki so smátt eisini farið at gera, eftir at teir fyri einum ári síðani vóru niðri óg vendu sum nummar 24.

Hjá Noreg stendur hinvegin einki til. Í nógv ár kappaðust teir um plássini á listanum við Svøríki og Danmark, men seinastu tvey árini hevur fallið verið øgiligt. Og hetta tykist halda fram. Í øllum førum munnu tey í Noreg vera alt annað enn fegin um, at tey fyri fyrstu ferð, síðani styrkislistin varð gjørdur, eru at finna niðanfyri Finnland.

Ísland stendur í stað á listanum, og so eru tað vit í Føroyum. Skal metast eftir styrkislistanum, so stendur ikki so væl til hjá okkum. Vit vóru nummar 113 fyri einum ári síðani, men hetta er so broytt til 127. Ein lítil glotti er tað tó kanska, at vit eru farin eitt pláss upp síðani november mánað.

Seinasta styrkislistin á árinum sær annars soleiðis út. Tølini í klombrum sýna, hvørja styrkismeting londini høvdu við ársbyrjan.

| | |
|---|---|
| 1 | Brasilia (1) |
| 2 | Frakland (2) |
| 3 | Spania (3) |
| 4 | Holland (6) |
| 5 | Argentina (5) |
| 6 | Kekkia (15) |
| 7 | Mexico (8) |
| 8 | Ongland (7) |
| 8 | Turkaland (9) |
| 10 | Italia (13) |
| 13 | Danmark (12) |
| 19 | Svøríki (24) |
| 40 | Finnland (43) |
| 42 | Noreg (26) |
| 58 | Ísland (58) |
| 126 | Føroayr (113) |